# Norðurlendskt átak móti heimsfarsótt

**Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður hevur verið á norðurlendskum ráðharrafundi í Keypmannahavn um eina norðurlendska tilbúgving móti eini heimsfarsótt**

HEILSUÁTAK




*Tað týdningarmesta í eini heimsfarsótt tilbúgving er at tryggja tað neyðuga koppingarevni, sigur Almanna- og Heilsumálaráðið*

Á fundinum fríggjadagin samdust teir norðurlendsku ráðharrarnir í heilsumálum um, at arbeiðast skal fyri einum samstarvi í sambandi við at framleiða eitt koppingarevni móti eini møguligari influensu heimsfarsótt (pandemi)

Fyrsta stigið til samstarv á hesum øki varð tikið á norðurlendska ráðharrafundinum í Føroyum 13.-15. juni í ár, har ráðharrarnir samdust um at seta ein fakligan bólk til at kanna møguleikarnar fyri at seta á stovn eina felags norðurlendska framleiðslu av einum koppingarevni móti influensu.

Orsøkin er, at um influensu heimsfarsótt skuldi borist á, er ikki nóg stór framleiðsluorka í heiminum til at nøkta tørvin av koppingarevni. Harumframt er vandi fyri, at tey lond, ið ikki sjálv hava ræði yvir ella luttaka í eini framleiðslu av koppingarevninum, eru munandi verri fyri enn tey lond, ið hava sína egnu framleiðslu.

Fakligi bólkurin var liðugur við sína frágreiðing í november í ár, ið vísir á fleiri møguleikar fyri samstarvi millum norðurlond. Frágreiðingin varð viðgjørd fyrstu ferð á norðurlendskum embætisfundi í Íslandi 23.-24 november í ár. Tá varð avgerð tikin um, at neyðugt var at halda ein eyka ráðharrafund 16. desember fyri at viðgera frágreiðingina og fáa staðfest, um tað politiskt var áhugi fyri víðari samstarvi, og á hvønn hátt eitt samstarv kundi skipast. Á embætisfundinum varð frá føroyskari síðu spurt, um Føroyar ikki kundu knýtast upp í samstarvið soleiðis, at vit í Føroyum eisini fáa nøkta tørvin á koppingarevni. Hetta vóru norðurlondini samd um.

Á fundinum fríggjadagin vóru norðurlendsku ráðharrarnir jaligir um eitt norðurlendskt samstarv. Avgjørt varð, at tvey modell, ið eru lýst í frágreiðingini, verða útgreinað í størri mun. Hetta arbeiðið skal vera liðugt í mars mánaði næsta ár. Tá verður eisini nýggjur ráðharrafundur hildin, har ítøkiligar avgerðir verða tiknar um, hvussu eitt samstarv skal skipast.

At seta á stovn eina felags norðurlendska framleiðslu av einum koppingarevni móti influensu tekur tíð. Í frágreiðingini verður hetta arbeiðið mett til 5 ár. Spurningurin er so, hvussu kunnu vit tryggja koppingarevni til Føroya fólk, til ein felags norðurlendsk framleiðsla verður sett á stovn. Í hesum sambandi hevur landsapotekarin, eftir áheitan frá Almanna- og heilsumálaráðnum, heitt á Statens Serum Institut, um at samráðast eisini vegna Føroyar við útlendskan framleiðara, um at tryggja atgongd til koppingarevni, um hetta verður neyðugt. Á ráðharrafundinum fekk landsstýrismaðurin at vita frá umboðum frá Statens Serum Institut, at áheitanin var tikin til eftirtektar soleiðis, at tey eisini samráðast vegna Føroyar.

Tað týdningarmesta í eini heimsfarsótt tilbúgving er at tryggja tað neyðuga koppingarevni. Tað eru tó eisini aðrir partar, ið skulu koma upp á pláss í eini tílíkari tilbúgving, sum t.d. kunning, viðgerðarhættir, mikrobiologisk tiltøk, antibiotika viðgerð, isolatión, karantenufyriskipanir v.m. Almanna- og heilsumálaráðið ætlar sær skjótast gjørligt at taka stig til at fáa skipa eina heimsfarsótt tilbúgvingarætlan fyri Føroyar.

HVAT YNSKIR TÚ TÆR INNAST INNI








SIRI
VÆLVERA
DR. JACOBSENSGØTA 18
TÓRSHAVN · 31 66 10
Sosialurin

HVAT YNSKIR TÚ TÆR INNAST INNI








SIRI
LINGERI
DR. JACOBSENSGØTA 18
TÓRSHAVN · 31 66 10
Sosialurin

Avgreiðslutíðir um jólini

Frá 27. desember til 30. desember 2005 eru avgreiðslutíðir okkara broyttar.

Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar hesar dagar frá kl. 10 til kl. 12.

Frá mánadegnum 2. januar 2006 verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 9 til kl. 15.



KREA.FO · TEL 47 80 80

Sí annars www.almannastovan.fo

almannastovan

**Tórshavn** · Jónas Broncksgøta 25
Postrúm 3096 · 110 Tórshavn
Tel 35 35 70 · Faks 35 35 71

**Norðoyggjar** · Klaksvíksvegur 78A
Postrúm 296 · 700 Klaksvík
Tel 45 72 40 · Faks 45 72 41

**Eysturoy** · Heiðavegur
Postrúm 224 · 600 Saltangará
Tel 47 47 10 · Faks 47 47 11

**Suðuroy**
Postrúm 58 · 800 Tvøroyri
Tel 35 35 60 · Faks 35 35 61